# Reglugerð fyri dagstovnar í Fuglafjarðar kommunu

## § 1
## Kommunalir stovnar

Dagstovnarnir í Fuglafjarðar kommunu eru kommunalir stovnar, ið er góðkendir við heimild í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt nr. 67 frá 10. mai 2000 við seinni broytingum. Stovnarnir eru skyldugir til at vera undir almennum eftirliti og fylgja teimum umsitingarligu fyriskipanum, ið eru ásettar sambært somu lóg.

## § 2
## Endamálið hjá stovnunum

1.stk.
Endamálið hjá stovnunum er yrkadagar við umsorgan, í tryggum og barnavinarligum umhvørvi, at menna og menta børnini á fullgóðan námsfrøðiligan hátt og í samvinnu við foreldrini at geva børnunum, sum eru búsitandi í Fuglafjarðar kommunu, eina kristna og siðalagsliga uppaling sambært dagstovnalógini § 2.

2.stk.
Javnstillað við 1.stk. er endamálið hjá stovnunum at samskipa tiltøk fyri børn, sum av fysiskum, sálarligum og sosialum orsøkum hava tørv fyri meiri stuðli enn tí, sum heimið megnar at geva.

1

## § 3
## Foreldraráð

1.stk.
Fyri hvønn stovn skal veljast eitt foreldraráð. Ráðið skal arbeiða fyri at styrkja samstarvið í millum foreldrini, stovnin og kommununa.

2.stk.
Leiðarin tekur stig til, at eitt ráð verður valt. Í ráðnum skulu vera 3-5 limir, sum verða valdir fyri tvey ár í senn. Fyri hvønn lim verður ein varalimur valdur.

3.stk.
Ráðið skal vera umboðað av foreldrum/verjum, sum hava børn á stovninum.

4.stk.
Býráðið ger viðtøkur fyri virksemi ráðsins.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## § 4
## Setanarviðurskifti og uppgávubýti

1.stk
Til tess at røkja dagligu leiðslu stovnsins, setir býráðið ein leiðara við námsfrøðiligari útbúgving.

Fuglafjarðar kommuna setur, eftir tilmæli frá leiðaranum, fólk í starv.
Eisini loysir kommunan fólk úr starvi eftir tilmæli frá leiðaranum. Uppsøgn av starvsfólki verður framd í tráð við tær til eina og hvørja tíð galdandi reglur.
Fuglafjarðar kommuna skal lýsa størv á dagstovnunum alment leys.

Fólk, sum verða sett í starv eftir hesi reglugerð, verða lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

2.stk
Stovnarnir hava opið yrkadagar, men kommunan kann eftir tilmæli frá barnaverndarnevndini geva loyvi til, at stovnurin kann hava opið alt samdøgrið ella í vikuskiftunum sambært § 3 stk. 2 í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt.

Stovnarnir eru stongdir 3 vikur um summarið og dagarnar millum jól og nýggjár. Harafturat er ráðleggingardagur fyri starvsfólkini tveir dagar um árið, ein á vári og ein á heysti. Hesar dagarnar eru stovnarnir eisini stongdir



3.stk.
Leiðarin hevur ábyrgdina av námsfrøðiligu leiðslu stovnsins og stendur fyri dagliga rakstrinum í samstarvi við kommununa.

4.stk.
Fuglafjarðar kommuna ger upptøkureglur, sum skulu góðkennast av landsstýrismanninum sambært § 4 stk. 2 í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt.

5.stk.
Kommunan hevur ábyrgdina av, at gjaldið, ið foreldrini skulu lata, verður kravt.
Leiðarin skipar fyri, at børnini verða skrásett tá ið tey møta á stovninum.

6.stk.
Leiðarin førir høvuðsbók við upplýsingum um tey børn, ið eru upptikin á stovninum, navn teirra og aldur, foreldur/verjar, og hvussu leingi tey vóru á stovninum, og um orsøkina til, at tey fóru av stovninum.

7.stk.
Leiðarin skipar fyri arbeiðsætlanum, frítíðarætlanum, skrásetur sjúkrafráveru o.s.fr.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

8.stk.
Leiðarin hevur ábyrgdina av, at óregluligar avgerðir ikki verða tiknar á stovninum. Um kommunan tekur avgerð, ið eftir uppfatan leiðarans er í stríð við galdandi reglur so sum sáttmála og tilíkt, hevur leiðarin skyldu til at boða kommununi frá hesum.

Um býráðið ikki er samt við leiðaranum hesum viðvíkjandi, kann avgerð kommununnar kærast til Mentamálaráðið.

## § 5
## Fíggjarætlan

1.stk.
Tað áliggur leiðaranum, saman við kommunalu fyrisitingini, at gera uppskot til fíggjarætlan, sum verður løgd fyri kommunustýrið til viðmerkingar og góðkenningar.

2.stk.
Er talan um størri útreiðslur, sum ikki eru innan fyri góðkenda fíggjarætlan, skulu útreiðslurnar ikki berast uttan góðkenning frá býráðnum. Keypið fer fram, eftir at tilboð eru fingin til vega og løgd fyri kommununa til støðutakan.

## § 6
## Eftirstøða

Um eftirstøðan fyri at hava barn á dagstovni fer upp um 3 mánaðir, kann kommunan avgera at siga plássið upp, tó soleiðis, at kommunan ella barnaverndin frammanundan hava viðgjørt spurningin, um heimild er at nýta frípláss, sambært kunngerð um gjaldsreglur fyri dagstovnar og dagrøkt nr. 84 frá 7. oktober 1999. 3

## §7
## Kærumøguleikar

Avgerðir, tiknar sambært hesi reglugerð, kunnu, innan 4 vikur eftir at kærari skrivliga hevur fingið fráboðan um avgerðina, kærast til Mentamálaráðið.

Býráðið kann broyta hesa reglugerð.

Reglugerðin er samtykt á býráðsfundi tann. 9. september 2022

Fuglafjørður, tann 26/9 2022

Vegna Fuglafjarðar kommunu

**Dávur Juul**
*Borgarstjóri*
**Í Støð 5**
**530 Fuglafjørður**

Dávur Juul
Borgarstjóri

//Jóanis Erik Køtlum
Kommunustjóri